

# 2009

## ÁRSROKNSKAPUR

| ***Innihaldsyvirlit*** | ***bls.*** |
|---|---|
| Leiðslufrágreiðing | 28 |
| Átekning leiðslunnar | 30 |
| Grannskoðanarátekning | 30 |
| Rakstrarroknskapur 2009 | 31 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2009 | 32 |
| Peningastreymsútgreining 2009 | 33 |
| Viðmerkingar | 34 |

### *Virksemi Menningargruns Útnorðurs:*

Í 2009 hevur Menningargrunnur Útnorðurs goldið 22,475 MDKK út í nýggjum lánum.
Í miðal eru seinastu trý árini goldnar yvir 20 MDKK út í lánum.
Játtaðu lánini í 2009 eru í samsvar við starvsætlanina, sum nevndin fyri Menningargrunn Útnorðurs hevur samtykt.
Úrslitið av rakstrinum í 2009 gjørdist eitt avlop, áðrenn burturleggingar, 3.747.202 DKK, og eftir burturleggingar 28.035 DKK.

Tann neiliga altjóða búskapliga gongdin ávirkar eisini tann føroyska og grønlendska búskapin, um enn tó í minni mun enn samanborið við onnur vesturevropeisk lond. Tey neiligu búskaparútlitini avmynda seg fyri Útnorðurgrunnin við størri burturleggingum móti tapi fyri roknskaparárið 2009.

Tann føroyski búskapurin hevur eins og flest aðrir búskapir verið merktur av afturgongd eftir at fíggjarkreppan á heysti 2008 gjørdist ein búskaparkreppa. Ein samanblanding av ávirkan uttanífrá og bygnaðarligum viðurskiftum hava ávirkað 2008. Eisini er oljuprísurin framvegis høgur samanborið við prísirnar undan 2008.
Tað hevur við sær, at høvuðsvinnan hevur ilt við at fáa raksturin at hanga saman. Almennu kassarnir hava eitt munandi hall, so tað er ein avbjóðing at fáa hesi hall tálmað komandi árini, uttan at tað ávirkar búskapin munandi. Landskassin fíggjar hallið við sølu av virðisbrøvum. Tað hevur verið avlop á gjaldsjavnanum seinnu árini, so samanlagt hevur samfelagið eina áogn uttanlendis upp á u.l. 4 mia DKK.
Alivinnan hevur havt ein vøkstur seinnu árini, og útflutningsvirðið var methøgt í 2009, tað var úti við ein heilan triðing av samlaða útflutninginum. Annars eru fiskaprísirnir við ársbyrjan 2010 hægri enn teir hava verið leingi.
BTF var við árslok 2009 mett at verða 11.784 MDKK, tað er eitt fall upp á 4,2% frá ársenda 2008. Tann seinasta almenna framskrivingin vísir, at BTF veksur við u.l. 3% hvørt av árunum 2010 og 2011.
Arbeiðsloysið er økt síðani kreppan byrjaði. Á sumri 2008 var tað 1,2%. Og við ársenda 2009 vaksið til 5,4%. Miðal prísvøksturin var -0,1% í 2009.
Í Føroyum hevur Menningargrunnur Útnorðurs havt flestu av sínum útlánum í fiskavirkjum.
Úrslitið fyri nøkur av hesum virkjunum verður ikki nøktandi fyri árið 2009, og virkini hava hall á roknskapinum.

Altjóða búskaparkreppan hevur eisini rakt Grønland. Ávirkanin er tó minni enn í flest øðrum londum. Tað er tí, at tað grønlendska sjálvstýrið fær ein blokkstuðul frá danska statinum, og sum er u.l. helvtin av teimum almennu inntøkunum. Almennu kassarnir eru undir trýsti. Roknskapurin fyri landskassan fyri 2009 gevur hall. Hallið er munandi størri enn ætlað. Grønlendska sjálvstýrið mátti útvega Royal Greenland gjaldføri. Hallið í 2010 verður mett til 200 MDKK, og er ætlað at minka fram til 2013. Hallið er higartil fíggjað við tí avlopsgjaldføri, sum hevur verið savnað saman undanfarin ár, tá ið tað var avlop á fíggjarlógini.

Tað hevur verið vøkstur í grønlendska búskapinum árini 2004 og fram til 2008. Í 2009 hevur tað verið ein minking sum fylgja av altjóða búskaparligu kreppuni. Mett verður, at tað hevur verið eitt fall upp á u.l. 2% í BTF. Innan fiskivinnuna, ið er nógv størsta útflutningsvinnan – fiskivinnan fevnir um 85% av samlaða útflutninginum – metir man, at tað verður eitt fall í rækjuveiðuni fyri 2010 – og at tað harvið verður ein minni framleiðsla. Rækjuprísirnir hava nú gjøgnum fleiri ár verið fallandi. Rækjuveiðan fevnir u.l. 60% av samlaða grønlendska fiskaútflutninginum. Eitt fall innan hesa vinnuna vil hava eina neiliga ávirkan á BTF fyri árið 2010.

Tann neiliga gongdin innan ráevnisvinnuna og sum er avleiðing av fíggjarkreppuni, kann somuleiðis hava eina neiliga ávirkan á gongdina í BTF. Miðal mánaðarliga arbeiðsloysið í 2009 var 4,6% av teirri møguligu arbeiðsorkuni, ímóti 4,0% í 2008. Prísvøksturin fall í 2009 samanborið við 2008. Prísvøksturin verður eisini mettur at verða lágur í 2010. Talið av ferðafólki í 2009 var u.l. 10% lægri enn í 2008. Útlitini fyri 2010 eru, at tað verður ein minni vøkstur í tali av ferðafólki samanborið við 2009.
Í Grønlandi hevur Menningargrunnur Útnorðurs í 2009 fíggjað 6 verkevnir við 7 lánum fyri tilsamans 22,475 MDKK.
Lánini verða býtt soleiðis, at 8 MDKK fara til 1 hotell, eina bátasølu fyri tilsamans 4,5 MDKK, eitt lán til ein ferðabát fyri tilsamans 2,9 MDKK, ein fyrisitingarbygning til eina grannskoðaraskrivstovu fyri tilsamans 3,5 MDKK, tvey lán til ein bilverkstað fyri tilsamans 2,375 MDKK og eitt lán til ein oljuflutningsbil fyri tilsamns 1,2 MDKK.

Menningargrunnur Útnorðurs hevur í sínari átaksætlan miðvíst arbeitt við at finna verkevnir uttan fyri ferðavinnuna. Tað er eydnast Menningargrunni Útnorðurs at luttaka í fígging innan fleiri vinnugreinar. Rentuinntøkur Menningargruns Útnorðurs fullu við 388.324 DKK samanborið við árið fyri. Minkingin stavar frá stóra fallinum á altjóða rentustøðinum.

Samlaði rakstrarkostnaðurin til fyrisiting er 3,376 MDKK (3,241 MDKK árið 2008). Burturleggingar til tap av útlánum

og útreiðslur til veð var 3,719 MDKK (4,083 MDKK árið 2008). Úrslitið av rakstri, áðrenn stuðul til NORA, gjørdist í 2009 28.035 DKK (125.149 DKK árið 2008) og eftir stuðul til NORA 0,00 DKK (0,00DKK árið 2008).
Sambært viðtøkunum skal eitt avlop upp til 1,5 MDKK latast NORA. 28.035 DKK er tí burturlagt í roknskapinum.

***Skrivstovur og starvsfólk:***
Menningargrunnur Útnorðurs hevur skrivstovu í Reykjavík, Nuuk og Føroyum. Grunnurin hevur 2 starvsfólk. Skrivstovan í Føroyum verður røkt úr Nuuk. Samlaða virksemið er 2 ársverk.

# ÚTGOLDIN LÁN

***Fimm lán vörðu útgoldin til grønlendsk verkevnir innan tænastuvirksemi:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Auto Nord Aps | • bilverkstaður | 2.000.000 DKK | 12 ár |
| Auto Nord Aps | • bilsverkstaður | 375.000 DKK | 5 ár |
| Yama Tek A/S | • goymsluhøll | 4.500.000 DKK | 15 ár |
| Sisimiut Olie | • oljuflutningsbil | 1.200.000 DKK | 7 ár |
| BK Revision Aps | • skrivstovubygningur | 3.500.000 DKK | 15 ár |

***Tvey lán vörðu útgoldin til grønlendsk verkevnir innan ferðavinnu:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Arne Niemann | ferðabátur | 2.900.000 DKK | 10 ár |
| Arctic Invest Aps | hotell | 8.000.000 DKK | 15 ár |

Útgoldin lán tilsamans til verkevni í útnorðri: 22.475.000 DKK

# ÚTLIT

Menningargrunnur Útnorðurs fer framhaldandi at víðka sambandið við vinnulívið í øllum trimum londunum í útnorðri, bæði tá ið tað snýr seg um einstøk verkevni í Føroyum og Grønlandi, og eisini í framtíðini, tá ið tað snýr seg um samstarvsverkevni.

Í Føroyum er Menningargrunnur Útnorðurs í sambandi við fyritøkur innan fleiri vinnugreinar. Framyvir fara útlánini at fevna um fleiri vinnugreinar.

Í Grønlandi hevur Menningargrunnur Útnorðurs eins og undanfarin ár luttikið í fígging innan fleiri vinnugreinar. Tað skal tó nevnast, at ferðavinnan framhaldandi er tann vinnugrein, Menningargrunnur Útnorðurs veitir flest lán.
Menningargrunnur Útnorðurs fer framyvir at sóknast eftir møguligum samstarvsverkevnum.

Ársúrslitið fyri 2009 var 28.035 DKK, áðrenn stuðul til NORA. Nevndin hevur ta fatan, at úrslitið er nøktandi, tá ið tað undir teimum givnu fortreytunum er møguligt at fáa eitt jaligt úrslit.

Nevndin væntar, at samlaðu nýggju útlánini í 2010 verða lægri samanborið við tað, ið goldið varð út í 2009. Úrslitið fyri 2010, áðrenn burturleggingar, væntast at verða lakari enn í 2009. Metingin verður grundað á, at rentan er fallin munandi í 2009.

Fer fiskivinnan í Føroyum framhaldandi at merkja eina niðurgongd, og ferðavinnan í Grønlandi at verða ávirkað neiliga av búskapargongdini í Vesturevropa, so kunnu tær fyritøkur, ið Útnorðurgrunnurin hevur fíggjað, væntast at fáa tap. Hettar kann enda við størri burturleggingum til at standa ímóti tapi hjá Útnorðurgrunninum, og harvið vil úrslitið verða enn lakari enn í 2009.

Menningargrunnur Útnorðurs hevur ein munandi part av sínari eginogn bundnari í útlánum. Hettar samanhildið við ótryggu búskaparútlitunum hevur verið avgerandi fyri, at tað hevur verið ein djúptgangandi viðgerð í nevndini. Nevndin hevur við støði í støðuni samtykt eina nýggja stavsætlan. Harafturat hevur Grunnurin útvegað sær eina kredittrammu upp á 10 MDKK, og sum skal tryggja, at Útnorðurgrunnurin hevur neyðugt gjaldføri, soleiðis at hann kann arbeiða eftir viðtiknu starvsætlanini. Starvsætlanin kann lesast á heimasíðuni hjá Útnorðurgrunninum. Nevndin heldur, at Grunnurin hevur neyðuga fæið, ið kann tryggja tað virksemið sum verður mett nøktandi, um enn nýggj úlán til nýggjar fyritøkur væntast at verða lakari, enn tað hevur verið seinastu árini.

## ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

**Jørn Birk Olsen**
Grønland – formaður

**Jens Erik Magnussen**
Føroyar – næstformaður

**Claus Juul Nielsen**
Danmark

**Elina Selinheimo**
Finnland

**Haukur Halldórsson**
Ísland

**Bjørn Normann Hansen**
Noreg

**Inga Thoresson-Hallgren**
Svøríki

Undirskrivað á nevndararfundi í Allinge, 20. apríl 2010:

**Sverri Hansen**
forstjóri

## GRANNSKOÐANARÁTEKNING

### *Átekning frá óheftum grannskoðara*

Til leiðslu og eigarar av Menngargrunni Útnorðurs.
Vit hava grannskoðað ársfrágreiðingina hjá Menningargrunni Útnorðurs fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2009.
Ársfrágreiðingin fevnir um leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreymsfrágreiðing, nýttan roknskaparhátt og viðmerkingar.

### *Ábyrgd leiðslunnar av frágreiðingini*

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrágreiðing, sum er í samsvari við lóg um ársfrágreiðing. Henda ábyrgdin fevnir um at gera, innføra og viðlíkahalda innanhýsis eftirlit, og sum er týðandi fyri, at ársfrágreiðingin verður gjørd soleiðis, at rættvísandi mynd fæst, og uttan týðandi skeivleikar, og uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Ábyrgdin hjá leiðsluni fevnir eisini um at velja og gera nýtslu av rímiligum roknskaparsiði og roknskaparmetingum, og sum eftir umstøðunum mugu mestast rímiligar.

### *Ábyrgd grannskoðarans*

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrágreiðingini. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi altjóða grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrágreiðingini.
Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrágreiðingini, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innhýsis eftirlitið, ið skal til, fyri at felagið kann gera eina ársfrágreiðing, sum gevur eina rættvísa mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsiseftirlitinum.
Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrágreiðingin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið eitt nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### *Niðurstøða*

Tað er fatan okkara, at ársfrágreiðingin gevur eina rættvísandi mynd av rakstri Menningargruns Útnorðurs fyri árið 2009, hansara ognum og skuldum við árslok 2009, peningastreymsfrágreiðingini fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2009, og at ársfrágreiðingin er í samsvari við lóggávuna og viðtøkurnar fyri Menningargrunn Útnorðurs.

Reykjavík, tann 8. apríl 2010

**Árni Snæbjörnsson**
Löggiltur grannskoðari

**Sveinn Arason**
Ríkisgrannskoðari

## RAKSTRARROKNSKAPUR *1. januar - 31. december 2009*

| | Viðmekingar | 2009 DKK | 2008 DKK |
|---|---|---|---|
| *RENTUINNTØKUR* | | | |
| Rentuinntøkur frá bankainnlánum | | 160.476 | 1.043.261 |
| Rentuinntøkur frá útlánum | | 6.924.301 | 7.343.189 |
| Gjadoyra og virðisjavnan | | (22.367) | (935.715) |
| **Rentuinntøkur tilsamans** | | 7.062.410 | 7.450.735 |
| *RENTUÚTREIÐSLUR* | | | |
| Rentuútreiðslur frá upptiknum láni | | 1.089 | 0 |
| **Rentuútreiðslur tilsamans** | | 1.089 | 0 |
| **Nettorentuinntøkur** | | 7.061.321 | 7.450.735 |
| *AÐRAR INNTØKUR* | | | |
| Aðrar inntøkur | | 62.157 | 0 |
| **Rentuútreiðslur tilsamans** | | 62.157 | 0 |
| **Aðrar inntøkur tilsamans** | | 7.123.478 | 7.450.735 |
| *RAKSTRARÚTREIÐSLUR* | | | |
| Lønarútreiðslur v.m. til fyrisiting og nevnd | | 1.627.138 | 1.551.047 |
| Útreiðslur fyrisiting | 1 | 1.697.167 | 1.689.619 |
| Avskrivingar, íbúð | | 51.972 | 0 |
| **Fyrisiting tilsamans** | | 3.376.277 | 3.240.666 |
| Tap og burturleggingar í árinum | 2 | 3.719.166 | 4.084.920 |
| **Tap og burturleggingar tilsamans** | | 3.719.166 | 4.084.920 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | | 7.095.443 | 7.325.586 |
| **Úrslit** | | 28.035 | 125.149 |
| Stuðul til NORA | 3 | 28.035 | 125.149 |
| | | 28.035 | 125.149 |
| *ÚRSLIT* | | 0 | 0 |

## FÍGGJARSTØÐA *tann 31. december 2009*

| Ogn | Viðmerkingar | 2009 DKK | 2008 DKK |
|---|---|---|---|
| *GJALDFØRI* | | | |
| Bankainnlán | | 7.172.046 | 12.936.555 |
| **Gjaldføri tilsamans** | | 7.172.046 | 12.936.555 |
| *ÚTLÁN* | | | |
| Útlán | | 111.410.562 | 105.453.255 |
| Yvirtikin veð | | 0 | 191.061 |
| **Útlán tilsamans** | | 111.410.562 | 105.644.316 |
| *MATERIELL STØÐISOGN* | | | |
| Íbúð | | 2.835.372 | 2.887.344 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | 2.835.372 | 2.887.344 |
| *AÐRAR OGNIR* | | | |
| Skuldarar | | 201.558 | 73.502 |
| **Aðrar ognir tilsamans** | | 201.558 | 73.502 |
| *OGN TILSAMANS* | | 121.619.538 | 121.541.717 |

| Skyldur | Viðmerkingar | 2009 DKK | 2008 DKK |
|---|---|---|---|
| *ONNUR SKULD* | | | |
| Ognarar | | 119.900 | 70.114 |
| Burturlagt til NORA | 3 | 153.185 | 125.149 |
| **Onnur skuld tilsamans** | | 273.085 | 195.263 |
| *LÁN* | | | |
| Lán íbúð | | 567.000 | 567.000 |
| **Lænt tilsamans** | | 567.000 | 567.000 |
| *EGINOGN* | | | |
| Stovnspeningur | | 91.284.091 | 91.284.091 |
| Tiltakspeningur, primo | | 29.495.362 | 29.495.363 |
| Flutt frá úrslit ársins | | 0 | 0 |
| **Eginogn tilsamans** | | 120.779.453 | 120.779.454 |
| *SKYLDUR TILSAMANS* | | 121.619.538 | 121.541.717 |

## **PENINGASTREYMSÚTGREINING** *fyri 2009*

| | 2009 DKK | 2008 DKK |
|---|---|---|
| *PENINGASTREYMUR FRÁ RAKSTRI* | | |
| Úrslit ársins | 0 | 0 |
| Postar, íð ikki hava ávirkan | 3.938.980 | 3.125.902 |
| **Broytingar frá rakstrarroknskapi** | 3.938.980 | 3.125.902 |
| *PENINGASTREYMUR FRÁ ÍLØGUM* | | |
| Avdráttir frá útlánum | 12.707.307 | 14.602.732 |
| Útgoldin nýggj lán | (22.475.000) | (28.450.000) |
| Innloyst veð/lán | 67.474 | (55.109) |
| Skuldarar | (53.056) | 68.500 |
| Íbúð | 0 | (2.320.344) |
| **Broytingar íløgur** | (9.753.275) | (16.154.221) |
| *PENINGASTREYMUR FRÁ FÍGGING* | | |
| Ognarar | 49.786 | 7.412 |
| **Broytingar í fígging** | 49.786 | 7.412 |
| **Ársins peningasrteymur frá rakstri, íløgum og fígging** | (5.764.509) | (13.020.907) |
| **Gjaldføri primo** | 12.936.555 | 25.957.462 |
| **Gjaldføri ultimo** | 7.172.046 | 12.936.555 |

## 1) Sundurgreinan av útreiðslum til fyrisiting:

| | |
|---|---|
| Húsaleiga og skrivstovuútgerð | 375.455 |
| Fundir og ferðir | 711.477 |
| Skrivstovuhald v.m. | 610.235 |
| ***Ialt*** | 1.697.167 |

## 2) Javnan av tapskonto:

| | |
|---|---|
| Burturlagt primo 2009 | 13.444.484 |
| Burturlagt í árinum | 3.719.166 |
| Staðfest tap í árinum | (548.435) |
| ***Burturlagt ultimo 2009*** | 16.615.215 |

**3)** Nevndin mælir til, at tað í 2009 sambært viðtøkum grunnsins, verður latin stuðul, svarandi avlopinum, sum er 28.035 DKK til NORA. Hendan upphædd er burturløgd í roknskapinum. Grunnsins stuðul til NORA í 2008 var 125.149 DKK. Stuðulin til NORA fyri 2008 varð útgoldin í februar 2010.